*-Í kvøld má eg ansa eftir mær*

*bretskur muslimur*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

ÚTLOND

# Skuldu spreingja trý flogfør um tíman í tríggjar tímar

**Bretsku myndugleikarnir siga, at tær ætlaðu yvirgangsatsóknirnar høvdu helst kravt umleið 2.700 mannalív.**

Í meiri enn eitt ár hildu bretsku myndugleikarnir eyga við bólkinum, sum arbeiddi við ætlanini um at spreingja fleiri ferðamannaflogfør, meðan tey vóru á flogi. Løgreglan og fregnartænastan hildu eyga við, hvar limirnir í bólkinum vóru, og hvat teir gjørdu. Harafturat helt løgreglan eyga við, hvussu nógvar pengar tey brúktu, og fregnartænastan legði loyniliga lurtiútgerð í hølini, har fólkini hildu fund.

Gjáranátina tordu myndugleikarnir ikki at bíða longur, tí tað var greitt, at tey fyrstu álopini kundu koma hvørja løtu. Løtu seinni vórðu 24 fólk tikin, men myndugleikarnir viðganga, at fimm ganga leys enn, og at høvuðsmaðurin aftan fyri álopsætlina er teirra millum.

Bretsku myndugleikarnir hava síðani valt at siga sum minst, men bretskir og amerikanskir fjølmiðlar siga seg hava fingið ymiskt at vita frá keldum innan løgregluna. Eitt nú siga teir seg hava fingið at vita, at álopsfólkini ætlaðu at søkja at flogførum, sum flúgva úr Bretlandi til New York, Washington og Kalifornia. Amerikanskir fjølmiðlar siga, at álopsætlanin umfataði flogfør hjá bretska flogfelagnum British Airways og teimum amerikonsku feløgunum American, United og Continental.

Fjølmiðlarnir hava eisini fingið at vita, at yvirgangfólkini ætlaðu at spreingja trý flogfør um tíman í tríggjar tímar, og at ætlanin var at spreingja flogførini, meðan tey vóru á flogi uppi yvir stórum býum, so atsóknirnar kundu krevja sum flest mannalív.

The Times skrivar frá keldum í løgregluni, at atsóknin kundi lættliga kravt umleið 2.700 mannalív.




# Bretsku muslimarnir stúra fyri hevnd

**Muslimarnir í Bretlandi stúra fyri, at fólk fara at gera seg inn á teir, eftir at myndugleikarnir avdúkaðu yvirgangsætlanina, sum muslimar høvdu lagt.**

Tað er greitt, at tey, sum vórðu tikin í sambandi við tær ætlaðu yvirgangsatsóknirnar í Bretlandi, eru bretskir ríkisborgarar av pakistanskum uppruna.

Tað ørkymlar nógvar bretskar muslimar.

-Í kvøld noyðist eg at vera varin, sigur tann 33 ára gamli Monirul Saadr við Reuters. Hann er ættaður úr Bangladesh, og tað síða svarta skeggið ger, at hann kann ikki fjala seg í mannfjøldini.
Talsmenn hjá teimum muslimsku samfeløgunum í Bretlandi søgdu í gjár stúra fyri, at bretar fara at uppfata allar muslimar sum yvirgangsmenn ella stuðlar hjá yvirgangsmonnum. Tí vænta teir, at muslimarnir verða skúgvaðir til viks í sambandi við starvssetanir, og teir óttast eisini fyri einum veksandi ágangi ímóti muslimunum í Bretlandi.

Harris Bokhari, sum er talsmaður hjá muslimska landsfelagsskapinum í Bretlandi, sigur við AP, at moskurnar eiga at boða løgregluni frá, hvørja ferð ein muslimur verður fyri ágangi orsakað av avdúkingunum í gjár.

## STUTT SAGT

### Castro stríðist fyri lívinum

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, vil vera við, at kubanski forsetin, Fidel Castro, stríðist fyri lívinum.



Herfyri varð Castro lagdur undir skurð, og almenna kubanska tíðindastovan segði tá, at forsetin fór at koma fyri seg aftur skjótt. Men Chavez, ið verður hildin at vera besti útlendski vinmaður hansara, sigur nú, at støðan hjá Castro er álvarssom, og at hann er í lívsvanda.

-Eg havi sagt honum, at vit biðja fyri honum hvønn dag og hvønn tíma, og eg vænti eisini, at hann fer at koma fyri seg aftur. Ja, eg veit, at hann fer at vinna hetta stríðið, segði Chavez í einari sjónvarpsrøðu í gjár.

Fidel Castro, sum verður 80 sunnudagin, hevur latið bróður sín stýra landinum, meðan hann er sjúkur.

### Russisk veiðitøl ikki álítandi

Russisku fiskivinnumyndugleikarnir hava upplýst, at russisk skip fiskaðu góð 95.000 tons av toski í Barentshavinum fyrra hálvár í ár. Tað eru góð 8.000 tons minni enn í sama tíðarskeiði í fjør, men norsku myndugleikarnir siga seg ivast í talinum.

Ein uppgerð hjá norska fiskivinnustýrinum vísir nevnliga, at russar fiskaðu umleið 140.000 tons av toski í Barentshavinum í fyrra hálvári, og tað er heili 47 prosent meiri, enn russar siga seg hava fiskað. Í norska reiðarafelagnum ivast tey ikki í, at tey norsku tølini eru meiri álítandi enn tey russisku.

-Russararnir hava ongantíð viðgingið, at teir fiska ov nógv, og upplýsingarnar um russiska fiskiskapin fyrra hálvár vísa bara, at tað gera teir framvegis ikki, sigur Reidar Nielsen í reiðarafelagnum við tíðindastovuna ANB.

Í fjør mettu norsku myndugleikarnir, at russar fiskaðu 101.000 tons meiri av toski, enn teir høvdu kvotu til, men teir rokna við, at talið verður nakað minni í ár.

### Fáa royk úr Russlandi

Liggjandi vesturætt hevur havt við sær, at tann nógvi roykurin frá fleiri skógareldum í Russlandi er farin at gera um seg í Finnlandi og Svøríki.

Tað hevur verið sera turt har vesturi í Russlandi í summar, og í seinastuni hava umleið 50 skógareldar verið nærhendis St. Pætursberg og á leiðunum við finska markið. Vindurin hevur borið roykin við sær langt inn um markið, og í Helsingfors hava fleiri fólk ringt til myndugleikarnar og kært seg um roykin, skrivar tíðindastovan YLE.

Heilt vesturi í Stockholm hava fólk eisini kært seg um roykin frá teimum russisku skógareldunum, og væntandi fara estlendingar at kæra sína neyð um vikuskiftið, tí teir finsku veðurmenninir siga, at tá fer roykurin tann vegin.